# Pakistanar funnið njósningarflogfar

Pakistanskir hermenn funnu í gjár eitt slag av robotti. Helst var talan um eitt amerikanskt njósningarflogfar. Luturin var funnin tætt við afganska markið, men amerikumenn nokta fyri, at teir hava mist nakað flogfar.
- Vit sóu okkurt í luftini, og ein skeyt tað niður. Vit eru vísir í, at talan er um amerikanskt flogfar, siga ónevndar keldur. Amerikumenn hava seinastu tíðina virkað nógv kring pakistanska markið.





Vinmaðurin, Rói Egholm, um Kaj Leo Johannesen:

# Málrættaður, trúfastur og eitt sindur naivur

Hóast Rói Egholm er fyrrverandi løgtingslimur fyri Tjóðveldi, eru hann og Kaj Leo Johannesen bestu vinmenn, bæði privat og í arbeiðshøpi. Eitt nú eru teir gubbar at børnunum hjá hvørjum øðrum og hava arbeitt saman í nógv ár, millum annað í fiskasøluni Farex, sum teir áttu saman.

Sambært Róa Egholm, er fleiri eyðkenni við Kaj Leo Johannesen sum menniskja og vinmann. Fremst av øllum nevnir hann, at komandi løgmaður er ómetaliga arbeiðssamur og málrættaður, tá hann setir sær eitthvørt fyri, og at hesin eginleikin helst fer at gagna honum væl í nýggja sessinum.

- Hann hevur eina góða framdrift og fær nógv frá hondini, tí hann letur seg ikki órógva av øðrum, sigur Rói Egholm.

Vinmaðurin vísir eisini á, at vinmaðurin, sum nú skal røkja løgmansembætið, altíð arbeiðir útfrá tí reina og lítur á tað góða í fólki.

- Kaj Leo Johannesen hevur onga fjalda dagsskrá og man veit altíð, hvar man hevur hann, sigur hann.

Rói Egholm vísir eisini á, at Kaj Leo Johannesen er ein góður liðspælari.

- Ein av bestu dygdum hansara er, at hann er trúfastur sum fáur – bæði í viðburði og mótburði, sigur Rói Egholm.

Skal vinmaðurin finna eitthvørt, sum er minni heppið við nýggja løgmanni, má tað vera, at hann kann tykjast nakað naivur viðhvørt.

- Kaj Leo trýr altíð uppá tað góða í fólki, og har kann hann blíva yvirraskaður, tá tey vísa seg frá hinari síðuni. Hann vil snøgt sagt ikki trúgva uppá, at fólk hava eina minni pena síðu.

Spurdur, hvussu hann roknar við at Kaj Leo Johannesen fer at roynast sum løgmaður, sigur Rói Egholm, at eins og allir aðrir nýggir løgmenn, skal hann brýnast eitt sindur og at venja seg við, at nú er hann ein eisini ein stovnur.

- Hann verður eitt fínt umboð fyri Føroya land, tí hann er ein savnandi og trúfastur persónur, sum vil tað góða, sigur Rói Egholm um vinmannin, sum nú verður løgmaður.



*Kaj Leo er einsamallur hani í einum reiðri við fýra systrum. Frá vinstri: Jakobina, sum lesur sálarfrøði í Danmark, Liss, Kai Leo og Marin, sum hevur harrafrisør í Vágsbotni. Yngsta systirin, Oddvør, vantar á myndini.*

**Kaj Leo atkvøddi fyri § 266 b.**
**Kaj Leo atkvøddi fyri einum valdømi.**



## Vinnulívsmaðurin

*Eftir loknan fólkaskúla fór Kaj Leo Johannesen úr sjeynda flokki beina leið til skips, 14 ára gamal. Tey næstu fýra árini var hann til fiskiskap við Flemish Cap við »Váðasteini« hjá Johan Simonsen.*
*Tá henda siglingstíðin væl og virðiliga var av, settist Kaj Leo aftur á skúlabonk, 18 ára gamal – hesa ferð á Føroya Sjómansskúla, har hann tók prógv sum skipsførari, 21 ára gamal.*
*Nú stóð hugurin aftur til havið, og tey næstu árini sigldi hann við bingjuskipið hjá Maersk og við farmaskipinum »Herborg« hjá Hans Paula Johannesen, áðrenn føturnir aftur vórðu settir upp á turt – hesa ferð fyri at arbeiða sum bilseljari hjá Reyni Service í Hoyvík.*
*Í 1989 fekk fiskurin aftur ein leiklut, tá Kaj Leo Johannesen kom í starv hjá Føroya Fiskasølu sum seljari við feskum og frystum fiski sum virkisøki. Í 1995 lá so leiðin norður til Klaksvíkar, har hann á Kósini var við til frá byrjan at byggja upp eina søludeild. Saman við øðrum stovnaði Kaj Leo í 1997 egið virkið, P/F Farex, sum keypti og seldi fiskavørur um allan heim. Virkið er ikki til enn.*
*Eivindur av Reyni lænti okkum hesa myndina frá Reyni Service í 1993*